

*Eitt av hæddarpunktunum á nýggjárskonsertini vóru tey trý Teitur Lassen, Eivør Pálsdóttir og Kári p. Tey sungu tvey løg hvør og endaðu so saman við "Súrligar nætur í Keypmannahavn" hjá Kára P*

# Ernst og Kári p vóru stjørnurnar

**Ernst Sondum Dalsgarð og Kári p vórðu stjørnurnar. Strongda sjónvarpsmanningin fekk kompliseraðu kabalina at ganga upp, meðan Poul Jákup Thomsen tuskaði runt. Ársins nýggjárskonsert, sum samstundis var eitt innsavningartiltak til neyðstøddu offrini í Suðurasia, var ein succes. Slakar seks milliónir vórðu savnaðar**



*Yndisligi sangfuglurin, Sigrid Rasmussen, kann annað enn at syngja. Sunnukvøldið var hon millum strúkararnar í Føroya Symfoniorkestri*



*Ernst Sondum Dalsgarð skaraði snøgt sagt fram úr sunnukvøldið.*

REPORTAGA
*Heini í Skorini og Páll Holm Johannesen*

*Heini_skorini@yahoo.com og pall@sosialurin.fo*

Klokkan er 17.58, og nú stundar veruliga til, at konsertin fer av bakkastokki. Alla vikuna hevur verið tosað og skrivað um stórfingnu konsertina, sum skal vera endaspurturin á innsavningini hjá Reyða Krossi.Tá tú kemur inn í forhøllina, varnast tú skjótt, at hetta er eingin tilvildarlig konsert. Útvarpið og Sjónvarpið hava boðað frá, at tey senda konsertina beinleiðis út í hvønn krók í kvøld.

Góðan tíma undan startskotinum renna teknikarar, vertir, samskiparar, hjálparfólk og sminkøsir í forhøllini. Hetta er seinasta freist at fáa síðstu bitarnar í fyrireikingunum upp á pláss. Tropparnir hjá SvF savnast í brekkuni í forhøllini. Øssur Winthereig og Høgni í Jákupstovu geva seinastu boðini, áðrenn farið verður út í luftina. Spenningurin er, sum hann plagar at vera, áðrenn eina beinleiðis sending. Kortini tykist sjónvarpsmanningin hava tamarhald á støðuni. Hvørki illbønir ella kjaftaslit eru at hóma.

Vertirnir hjá SvF, Bogi, Tórður og Sigrun eru eisini til reiðar. Maiken hevur rættað slipsaknútarnar, sett hárið, putrað og smurt maskara, so tey trý verða etilig hjá føroya fólkið komandi fýra tímarnar.

Rundan um kantinuna í forhøllini ganga mannligu kórsangararnir við sangmappunum undir arminum. Baksið við at lata seg í butterflyina og at strúka svørtu buksurnar og hvítu skjúrtina er av, og nú er bara at brynja seg við toli til boð verða eftir teimum í konserthøllini. Flestu teirra eru álvarsamir og royna at savna tankarnar. Teir ganga í hvør sínum lagi í forhøllini, og tað tykist sum um teir helst vilja hava frið, áðrenn teir skulu á pallin.

Meðan stemningurin í forhøllini millum kórsangararnir tykist vera álvarsamur og friðarligur, er lítið friðarligt yvir Pollaranum. Poul Jákup Thomsen tuskar í sínum eyðkenda stíli runt sum eitt óløgi millum forhøllina, Klingruna og konsertsalin. Tey seinastu praktisku tingini eru við at koma upp á pláss. Áhoyrararnir, sum koma inn í forhøllina úr illfýsna veðrinum royna at fanga hann á máli, men hann er noyddur at gera skjótt av, tí konsertin er við byrja, og alt er eftir øllum døma ikki komið heilt komið upp á pláss.

Seinasta hálva tíman tysja fólk inn í Norðurlandahúsið, og góðar 10 minuttir fyri startskotið eru nærum allir stólarnir upptiknir. Nógv eru farin í fínasta stás til konsertina. Stutt fyri byrjan kemur Kári p gangandi eftir trappunum oman í Klingruna. Fólkakæri vísusangarin er smæðin og hyggur niður í gólvi. Fólk í salinum eru skjót at venda eyguni ímóti